# Fleiri tímar við útvarpi

**Mánadagin fer útvarpi undir vetrarskrá sína, og tá fara lurtararnir at fáa fleiri tímar við útvarpi, enn teir fingu til dømis farna vetur**

ÚTVARP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Vit hava havt sera stórar lønarhækkingar í fleiri ár, sum vit ikki hava fingið endurgjald fyri á fíggjarlógini. Hetta merkir, at vit nú noyðast at skerja eitt lítið sindur í útboðnum av sendingum, sigur Jógvan Jespersen, stjóri í Kringvarpi Føroya.*

*savnsmynd*

Ímun til undanfarnar vetrar, tá sent hevur verið til klokkan tíggju, fer útvarpið nú komandi vetur at senda til klokkan ellivu á kvøldi gerandisdagar. Eisini leygarkvøld verður broyting í, tí ein nýggj sending fer í luftina, sum verður send millum klokkan gott tíggju og eitt um náttina.

## Nakrar sendingar eru burtur

Stjórin í Kringvarpinum, Jógvan Jespersen, sigur, at skráin í ár annars verður rættuliga meinlík teirra frá síðsta vetur.

- Vit koma at senda eitt sindur longur, og tær flestu sendingarnar, ið vanliga eru á skránni um veturin, verða aftur at hoyra í vetur, so sum Føroyar í dag, 5'arin og Zip. Eisini verða sendingarnar úr Suðuroy og Norðoyggjum, Viðurgerði og Heimabeitið aftur á skránni í vetur, men sendingin úr Eysturoynni hvílur í vetur, sigur Jógvan Jespersen.

Nýggja sendingin, sum verður á skránni seint leygarkvøld, verður ein sending, ið verður gjørd í Klaksvík, og tað eru teir báðir, Gunnar Nolsøe og Fróði Løkságarð, ið koma at skipa fyri henni.

Umframt sendingina úr Eysturoynni er eisini sendingin, Sjónarringurin, við tilfari uttan úr heimi heldur ikki á skránni í vetur, men Jógvan Jespersen sigur, at hetta ikki merkir, at tær eru farnar í søgubókina.

- Vit hava áður gjørt tað, at ein sending, ið hevur verið á skránni í fleiri ár, sleppur at hvíla ein vetur, so tað er einki óvanligt í tí, sigur hann.

## Vilja hækka útvarpsgjaldið

Kringvarpsstjórin greiðir frá, at tað eru øktar útreiðslur, ið gera tað neyðugt at skerja eitt sindur í útboðnum av sendingum.

- Vit hava havt sera stórar lógarbundnar lønarhækkingar í fleiri ár, sum vit ikki hava fingið endurgjald fyri á fíggjarlógini, og tí noyðast vit at skerja, sigur Jógvan Jespersen.

Hann váttar eisini, at leiðslan í Kringvarpinum hevur søkt um loyvi til at hækka útvarpsgjaldið við 100 krónum upp í 1.600 krónur. Útvarpsgjaldið hevur seinastu fimm árini verið 1.500 krónur.

Enn hevur Jógvan Jespersen tó ikki fingið svar upp á hesa umsókn, og tí dugir hann ikki at siga, hvussu støðan verður komandi ár.

# Ein sending til alt fólkið

**Annar av teimum, sum skal leggja nýggju leygarkvøldssendingina hjá útvarpinum tilrættis, Gunnar Nolsøe, sigur, at ætlanin er at gera eina sending, sum skal verða til alt fólkið**

ÚTVARP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Gunnar Nolsøe verður annar teirra, sum skal leggja nýggju leygarkvøldssendingina hjá útvarpinum tilrættis. Hann sigur, at sendingin skal fevna víða, so at øll kunnu lurta eftir henni.*

*savnsmynd*

Hóast vetrarskráin hjá útvarpinum byrjar komandi mánadag, so fer nýggja leygarkvøldssendingin neyvan í luftina fyrr enn um hálvan oktobur.

## Eru øgiliga spentir

Gunnar Nolsøe sigur, at ætlanin er, at sendingin bæði hvat viðvíkur innihaldi og tónleiki skal fevna øgvuliga víða, so at øll kunnu lurta.

- Vit eru øgvuliga spentir upp á sendingina, og hetta er nakað, ið vit hava arbeitt við í langa tíð. Vit byrjaðu longu farna heyst at gera eitt útkast til, hvussu sendingin skuldi síggja út, og vit hava arbeitt víðari við hesum farna vetur og í ár, sigur hann.

Viðvíkandi innihaldinum í sjálvari sendingini sigur Gunnar Nolsøe, at tað fara at verða bæði nakrir fastir tættir hvørt kvøld og so nakrir tættir, ið eru á skránni umleið einaferð um mánaðin.

- Hvørt kvøld fara vit til dømis at hava eina lýsing av einum starvi og eina reportasju, meðan vit einaferð um mánaðin til dømis fara at hava ein entertainara og ein kokk. Somuleiðis fara vit at hava fýra temaleygarkvøld, har vit fara at varpa ljós á eitt ártíggjund. Vit fara at gera hvør sína sending um sekstiárini, sjeytiárini, áttatiárini og nítiárini, sigur Gunnar Nolsøe.

Nýggja sendingin hjá klaksvíkingunum báðum verður gjørd í Studio Pegasus, og sent verður beinleiðis. Sjálvsagt verða innsløg, sum eru bandaði, men sendingin sjálv er beinleiðis allar teir slaku tríggjar tímarnar, ið hon er í luftini.

Hi-Fi
damor

LG LCD Sjónvarp



tilboð 4.998,-
Sera snøgt snið · Upploysn: 800x600 · Scart og phono inngang
Tekst Varp 10 Síður · Vanligur prísur 5.498,-

Pakkatilboð við surroundljóð í top-góðsku



tilboð 7.998,-
**Surroundforsterkari:** 5x40W við innbygdum radio
**DVD avspælari:** við pixelstýring og MP3 avspælara
5 Surround hátalarar og subwoofer
Vanligur prísur: 13.194,- **Spar 5.196,-**

Thomson Ghettoblaster



tilboð 598,-
CD/Kassettuband/Radio · Twin Bass Sound · Vanligur prísur 698,-

LG Komplett Surround System



tilboð 2.998,-
DVD, CD, MP3, Divx, Radio 420W RMS, sum gevur sera gott ljóð!
5 x 2 Vegis hátalarar + Subwoofer Vanligur prísur: 3.498,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor